# Diamantbrúdleyp



9. desember í ár hava Hilda og Daniel Peter Næs (nevndur Allin) verið gift í 60 ár, og kunna tey so statt halda sítt diamantbrúdleyp, og tað gera tey.

Tey eru bæði fødd og uppvaksin í Nesi í Hvalba. Tey eru javngomul, fødd í 1925 og gift í 1950.

Tey settu búgv við Geilánna millum Gøtuna og Vegin oman í Støð. Her hava tey búleikast sum foreldur, omma og abbi, langomma og langabbi altíð til reiðar at taka tey tøk heiminum og bygdalívinum, tørvur er á.

Bygdalívið - alt samfelagið - er broytt so ómetaliga nógv í teirra tíð hesi 85 árini.

Í teirra barnaárum var øll gongd eftir Gøtuni innan fyri Geilánna.

Tú sá menn í stúvlum við leypi á bakinum fara oman eftir gøtuni. Í leypinum var lodd og snøri, einar oljubuksur og eitt lítið matskrín. Um kvøldið komu teir niðan aftur við nøkrum fiskum eisini í leypinum, sjálva veiðuna høvdu teir avreitt í fiskaneystinum.

Nú er gøtan grasvaksin, sæst ikki longur. Tú sært næstan heldur ikki fólk ganga , og leyp sært tú als ikki hvørki oman í Støð ellan niðan úr Støð. Nú er øll ferðsla við bili oman og niðan eftir asfalteraða vegnum oman í Støð, men fólk sært tú næstan ikki.

Í barnaárinum var vanligt, at báði Hilda og Allin saman við javnaldrum gingu niðri í Salttaranum, niðri í Agnavík og úti undir Bakkanum, úti á Bønhústanga og tóku øður og stungu fliður til agn hjá útróðrarmonnum - faðiri og brøðrum. Nú kenna børn valla øður og fliður, enn minni hvat tær hava verið brúktar til í bygdalívinum.

Øll hesi 60 árini í hesum skiftandi samfelagi hevur Hilda við sama lag sum húsmóðir trúfast hildið húsini heit og hugnalig við " opnum" durum og borðreiddum borði fyri einum og hvørjum, sum í ørindum ella av góðum vana koma inn á gáttina, soleiðis sum hesin góði siður enn verður varðveittur mangastaðni í Føroyum. Kúgvin og ikki at gloyma heimaseyðurin vóru ikki at gloyma.

Á fimtanda ári fór Allin til skips, og til sjós var hann øll mandómsárini. Hann fekk alla úrreivingina við frá útróðri við arábáti, deksbáti, sluppum við snøri og línu, á vári og sumri út á heystið.

Seinastu tíðina var hann við trolara allar ársins tíðir.

Men longu í ungdómsárunum hevði hann eisini serstakan hug at velta. Hann hevði tað eftir abbanum, sum hann eisini hevði navnið Daniel Peter eftir, søgdu fólk. Hetta vísir eisini Slokkastykkið, sum hann hevur velt um aftur alt, sum tað er, og drenað hvørja einastu veit, so at bilurin kann koyra heilt niðan á stykkið - eitt prýði í okkara tíð. Hetta fekk hann mest stundir til um vetrarnar í slupptíðini.

Frá óvitaárunum slapp Allin við til bjargar við pápa sínum. Hetta førdi til, at hann frá unglingaárunum og upp í mandómsárini var fastur bjargamaður og siðmaður báði í bjørgunum vestanfyri og í Lítlu Dímum, har hann alla sína tíð hevur røkt hálvan gyllin til hann var 83 ára gamal.

Hjá bjargamonnum og sjómonnum liggur ofta meira ásýnligt vátt undir fóti, sum sagt verður. Tað veit Allin eisini um at siga, ein maður, sum ofta hevur verið heitt á, og sum ongantíð hevur borið seg undan, tá ið á hevur staðið.

Ein lítil søga um eitt manndómsbragd kann kortini verða tikin fram í hesum sambandi. Hann var staddur sjálvur annar umborð á einum motorbáti, tá ið eldur kom í niðri í motorrúminum, har báðir mennirnir vóru staddir. Alt í einum stóð flamman upp gjøgnum kappan. Allin breyt seg upp gjøgnum eldin og var tá sjálvur sum ein brennandi fakkul, tí eldurin festi væl í hansara oljudálkaðu klæði. Hann leyp fyri borð, og á tann hátt sløknaði eldurin í klæðum hansara. Síðan tók hann seg inn aftur í bátin brendur báði á hondum og kroppi, fekk fatur í eini pøs, sum hann so pøsaði sjógv niður í motorrúmið við, til eldurin slóknaði, og báði maðurin, sum niðri undir var, og báturin vóru bjargaðir.

So miklan skaða fekk hann av hesum brunasárum, at eftir hetta fór hann ikki til skips við trolara aftur. Hann fekk kortini eitt gott heimalív í bø og haga við velting og hoygging og seyði, ja, enntá stundir at hjálpa Hildu at baka kakur. Tað hevði hann ongantíð áður havt stundir til.

Til lukku við Diamantbrúdleypinum bæði tvey.

**Johs.**






---

**Peter Ove Eliasen**
**Klaksvík**

andaðist sunnudagin á Klaksvíkar sjúkrahúsi, 65 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum í kvøld kl. 18.00 heim í Betesda.

Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13.00.

***Familjunnar vegna***
**Elsa Maria**

---

## TØKK

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá elskaði maður mín, verfaðir og abbi okkara

**Gunnar Poulsen**
**Tórshavn**

andaðist og varð jarðaður.

Takk til Hera Joensen, prest, kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravara.
Takk til tykkum, sum stóðu fyri ervinum og til tykkum, sum bakaðu.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Skúvoyar kirkju.
Takk til tykkum mongu, sum komu at fylgja.

***Familjunnar vegna***
**Helena, Óluva, Jákup og Bára**


